# Býráðið

**Dagfesting:** 26.09.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Sheila S. Sóldal fyri David Andreasen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 28/24 | 24/00352-4 | Broyting av byggisamtykt á Kambsdali. |
| 29/24 | 24/00439-1 | Merritútbúgving til námsfrøðingar |
| 30/24 | 23/00552-2 | Botnakanningar uttanfyri landøki hjá Bakkafrost |
| 31/24 | 24/00390-1 | Avtøka av grundstykkjalistanum |
| 32/24 | 24/00469-1 | Eykajáttan heyst 2024 |
| 33/24 | 24/00250-5 | Uppskot til ársfíggjarætlan 2025 |
| | | |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**28/24**
**24/00352-4 Broyting av byggisamtykt á Kambsdali.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 34/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 28/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | **Broyting av byggisamtykt á Kambsdali matr.nr. 871e**<br>Vegna vaksandi tørv á byggilendi, verður skotið upp at broyta byggisamtyktina fyri Kambsdal. Uppskotið fevnir um at víðka sethúsaøkið Oman Rygg omaneftir, sí kortskjal.<br>Økið verður broytt soleiðis at ein partur av E:Almennir stovnar, verður broytt til B: Sethúsøki og ein partur verður broyttur til I:Fríøkið. Sostatt verður økið E:Almennir stovnar skrikað. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tørvur á byggilendi til sethús | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at uppskotið verður samtykt | | |
| Dagf | 6.9.2024 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**
Tekniska nevnd mælir einmælt til at broyta byggisamtyktina frá almennum stovnum til bústaðarøki. Tó mælir nevndin til at stykkið norðanfyri ánna yvur ímóti Dugna verður broytt til A Miðstaðarendamál, við serligum ásetingum fyri bústað upp til 3 búeindir. Tekniski leiðari ger nýtt kort til góðkenningar.

**Býráðið 26. september 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um at broyta byggisamtyktina á Kambsdali.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 29/24
## 24/00439-1 Merritútbúgving til námsfrøðingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 09.09.2024 | 13/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 50/24 |
| 3 Býráðið | 26.09.2024 | 29/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í november 2023 valdi býráðið hjá Tórshavnar Kommuna at betra um støðuna á dagstovnaøkinum við at játta, at eitt hold uppá 30 hjálparfólk kundu fáa stuðul til eina merittútbúgving í námsfrøði frá Tórshavnar Kommunu. Upprunaligan ætlanin var, at 30 hjálparfólk skuldu byrja útbúgvingina í 2024 og at kommunan í inniverandi ári skal taka støðu til eitt nýtt hold uppá 20 hjálparfólk sum kunnu byrja í 2025. Tað vísti seg, at stórur áhugi var fyri útbúgvingini, men at fleiri av teimum áhugaðu ikki livdu upp til upptøkukrøvini. Tí bleiv holdið sum byrjaði í 2024 bert uppá uml. 20 hjálparfólk. Tey sum ikki livdu upp til krøvini, kundu fyrirekia seg til nýggja upptøkuroynd, og kunnu byrja uppá útbúgvingina í januar 2025, tá ið næsta hold byrjar.<br><br>Talan er um fjarlestur hjá VIA University Collage í Viborg. Merittútbúgvingin í námsfrøði hevur við sær, at tann lesandi er í starvi hjá kommununi, meðan hann er undir útbúgving. Tann lesandi skal liva upp til somu krøv sum í eini vanligari útbúgving í námsfrøði. Munurin er tann, at hendan útbúgvingin er lagað til tey, sum røkja eitt starv í gerandisdegnum. Lestrartíðin er 3,5 ár, ella 7 lestrarhálvár (semestur). Kravið fyri at verða upptikin á merittútbúgvingina er, at tann lesandi hevur 2 ára arbeiðsroyndir í einum námsfrøðiligum starvi og at tann lesandi hevur staðið ávís fak á miðnám ella staðið eina ítøkiliga meting av førleikum hjá tí lesandi, sum útbúgvingarstovnurin fremur.<br><br>**Kostnaður og hvør rindar:**<br>Kostnaður fyri útbúgvingargjald er uml. 9.000 pr. lestrarhálvu. Lesandi hjá Tórshavnar kommuna hava harafturat fingið játta eitt ferðaískoyti uppá tvær ferðir 2.000 kr. pr. lestrarhálvu fyri ferðing aftur og fram FO-DK-FO, og eitt ískoyti á 500 kr. pr. nátt fyri |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Stød 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">gisting (tilsamans 10 nætur pr. lestrarhálvu), meðan tann lesandi er í Danmark.<br><br>Tann lesandi fær ikki løn, meðan hann er í Danmark í útbúgvingarørindum ella meðan hann hevur fjarundirvísing í Føroyum.<br><br>Tann lesandi rindar sjálvur fyri tilfar o.t. í samband útbúgvingina, og tann lesandi rindar sjálvur fyri aðrar útreiðslur í Danmark, t.d. kost.<br><br>Samlaður kostnaður at útbúgva eitt hjálparfólk til námsfrøðing er 18.000 kr pr. Semestur í 7 semestur.<br><br>Tórshavnar kommuna hevur haft eitt kunningartiltak fyri kommununum í føroyum, har VIA luttók og kunnaði um merittútbúgvingina. Stovnsleiðararnir frá Fuglafjarðar kommunu vóru við til kunningartiltakið saman við borgarstjóra og kommunustjóra. Stovnsleiðararnir hava eitt stórt ynski um, at kunna bjóða hjálparfólkum á okkara stovnum sama møguleika. Tí verður søkt um, at trý hjálparfólk (eitt frá hvørjum av okkara stovnum) kunnu fáa játta merittútbúgving í námsfrøði.<br><br>Upptøkukrøv:<br>Starvsfólk á VIA University Collage taka avgerð um, hvørjir umsøkjarar lúka krøvini at lesa til námsfrøðing. Upptøka verður kortini samskipað við kommununa fyri tey lesandi, sum kommunan rindar útbúgvingina fyri. Um Fuglafjarðar kommuna sum arbeiðsgevari rindar fyri útbúgving vm., tilskilar kommunan sær rættin til at velja, hvørji hjálparfólk í føstum starvi, fáa útbúgvingina uttan kostnað, eftir ávísum treytum. Her verður serliga hugsað um starvsaldur og starvsbrøk hjá tí lesandi.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Trot á námsfrøðingum</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td>x</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til, at Sosiala nevnd tekur støðu til, um Fuglafjarðar Kommuna kann játta merittútbúgving í námsfrøði til hjálparfólk á dagstovnunum. og í so fall, hvussu nógv kunnu fáa játta útbúgvingina. |
| Dagf | 8. september 2024 |

**Sosiala nevnd 09. september 2024:**
Sosiala nevnd tekur undir við tilmælinum um at játta, at trý starvsfólk kunnu fáa góðkent stuðul til merittútbúgving í námsfrøði. Sosiala nevnd sendir málið víðari til fíggjarnevndina til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin 23. september 2024:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at Fuglafjarðar kommuna, sum eina roynd játtar, at senda trý starvsfólk á útbúgvingina og at royndin árliga verður endurskoðað. Nevndin mælir til at skeiðið verður boðið út til starvsfólk sum hava arbeitt meira enn 4 ár á dagstovnunum hjá Fuglafjarðar kommunu. Játtanin verður endiliga viðgjørd í samband við FÆ 2025 arbeiðið.

**Býráðið 26. september 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevdnini.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## 30/24
## 23/00552-2 Botnakanningar uttanfyri landøki hjá Bakkafrost

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 07.12.2023 | 19/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 14.05.2024 | 17/24 |
| 3 Býráðið | 26.09.2024 | 30/24 |

## Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndin | | |
| Stutt lýsing av málinum | Úti á vestara landi matr. nr. 984 er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu. Verandi byggisamtykt vísir at matrikkulin liggur í Havnaøkið, tó manglar partur av matrikklinum at gerast til havnaøkið. Hetta merkir at partur av matr. nr. 984 skal broytast til havnaøkið. Talan er um verandi útfylling + eini 50m afturat.<br>Fyri at Fuglafjarðar kommuna kann gera hesar útbyggingar og broytingar, er neyðugt at gjørdar vera botnkanningar. Eisini er talan um streymmátingar sum mugu gerast fyri økið.<br>Arbeitt hevur verið við Biofar um at geva prís uppá at gera botnkanningar uttanfyri landøkinum hjá Bakkafrost. Tilboð eru komin inn sum skulu viðgerast | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Fyritøka í bygdini hevur víst áhuga í at byggja á havnaøkinum. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kort av økunum | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | x |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at botnkanningar verða gjørdar áðrenn broytingin fer fram, soleiðis at kommunan veit um avleiðingar verða av útfyllingini.<br><br>**Tilmæli til fundin 14.05.2024:**<br>Tekniski leiðari mælir til at vinnu- og havnanevndin viðgerð innkomnu tilboðini og avgerð um hvussu nógvar kanningar skulu gerast. Eisini skal avgerð takast um hvørjum rakstrarstaði peningurin skal takast av. | | |

7

| Dagf | 06.05.2024 |
|---|---|

**<u>Vinnu- og havnanevndin 07. desember 2023:</u>**
Vinnu- og havnanevndin mælir einmælt til at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðara um at gera botnkanningar fyri økið.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 14. mai 2024:</u>**
Vinnu- og havnanevndin metir at ein heildarætlan yvir øki eigur at vera gjørd. Og heitt verður einmælt á býráði um at arbeiða við og at leggja eina politiska ætlan fyri øki, har hædd verður tikin fyri hvussu atkoman til øki skal vera og hvat øki skal brúkast til.

**<u>Býráðið 26. september 2024:</u>**
Býráðið atkvøddi 7 fyri, at málið verður sent aftur til Vinnu- og havnanevndina. Sonni á Horni og Ólavur Larsen atkvøddu blankt.

8

## 31/24
## 24/00390-1 Avtøka av grundstykkjalistanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 35/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 31/24 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð | | |
| Stutt lýsing av málinum | Í samband við  Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, hevur borgarstjórin heitt á at fáa grundstykkjalistarnar í kommununi strikaðar. Í kunngerðini stendur í §2 stk. 4,  kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum. Fuglafjarðar kommuna hevur onga mannagongd sum er samtykt, um hvussu sølan kann fara fram. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Borgarstjórin heitt á at fáa grundstykkjalistarnar í kommununi strikaðar | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | x |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at nevndin tekur politiska støðu til endaliga avgerð í býráðnum, um annahvørt<br>- at strika grundstykkjalistarnar ella<br>- at Fuglafjarðar býráð fær gjørt eina mannagongd fyri sølu og tillutan av grundstykkjum til borgarar, sum standa á grundstykkjalista hjá Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Dagf | 06.09.2024 | | |

**<u>Tekniska nevnd 12. september 2024:</u>**
Tekniska nevnd mælir býráðnum til ikki at strika bíðilistan, men at kommunan ger fastar mannagongdir fyri tillutan av grundstykkjum til borgarar, sum standa á grundstykkjalista hjá Fuglafjarðar kommunu. Og nevndin heitur á teknisku umsiting um at kanna mannagongdirnar í øðrum kommunum sum hava bíðilistar.

**<u>Býráðið 26. september 2024:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um ikki, at strika bíðilistan, men at gera fastar manngongdir fyri tillutan av grundstykkjum er gjørd.

10

## 32/24
## 24/00469-1 Eykajáttan heyst 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 52/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 32/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fíggjarárið 2024 er nú liðið so mikið at tað er sjónligt at játtanin á ávísum økjum ikki fer at halda. Umsitingin hevur gjøgnumgingið játtan og nýtslu og er komin framm til, at áleið DKM 3,4 resta í fyri at fáa játtanina at halda. Høvuðsorsøkin til hetta er at økið 3 ikki megnar at halda sína játtan. Mælt verður til at økið 3 fær áleið DKM 2,1 eyka. Hetta skyldast í mestan mun lønarlyft,, eins og nýggji sáttmálin við pedagogfelagið er lutfallsliga nógv hækkaður. Somuleiðis hava sjúkrameldingar viðført hægri rakstrarkostnað enn væntað.<br>Hini økini, ið biða um eykajáttan eru:<br>Økið 1: 100.000 vegna hækkandi kostnað<br>Økið 6: Ov lítið er avsett til lønarpartin á ávikavist kirkjugarðar og vatnveiting. Somuleiðis eru kloakkir í verri standi, eins og bilar og maskinum krevja nógvar ábøtir.<br>Á økið 7 er sáttmálin um nýggja sløkkiliðsbilin undirskrivaður. Veitarin ynskir at gjaldið fyri bilini verður skrúva øðrvísi saman og er tískil neyðugt við nýggjari játtan á DKK 286.000.<br>Bilurin gerst ikki dýrari enn áður fráboða.<br>Umsitingin metir ikki tað vera gjørligt at spara DKM 3,4 seinastu mánaðarnar í árinum og mælir tískil til, at politisk støða verður tikin til, hvørt meirnýtslan skal fíggjast av íløgujáttan fyri árið 2024, ella um fíggjast skal við innistandandi. |

11

Eykajáttan Heyst 2024

| RS | Flytingar frá | Upphædd | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| RS | Flyting til | Upphædd | Viðmerking |
| 130 | Kommunuskrivstovan | 100.000 | Keyp av vørum og tænastum |
| 310 | Barnalund | 450.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| 314 | Stropin | 535.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| 318 | Kambur | 1.100.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar, sjúkramelding |
| 636 | Kirkjugarðar | 75.000 | lønir |
| 650 | Vatnveiting | 400.000 | lønir |
| 660 | Kloakkir | 200.000 | Keyp av vørum og tænastum |
| 672 | Kavarudding | 100.000 | ov lítið sett av |
| 680 | Gøtuljós | | Kontan tóm |
| 681 | Gøtuljós íløgur | 90.000 | Meirnýtsla |
| 690 | Bilar og maskinum | | ov lítið sett av |
| 691 | Bilar og maskinur (íløga | 60.000 | ov lítið sett av |
| 771 | Sløkkiðlið (íløgur) | 286.000 | Býtið av ætlað kostnaðinum verður ørvísi, meðan samlaði kostnaðurin ikki verður hægr |
| | | 3.396.000 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum. | | |
| Grundarlag | • Grundarlag: Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• Viðfest: Heyst Yvirlit yvir flytingar til eykajáttan.xls og Eykajáttan 2024 – frágreiðingar | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin gjøgnumgongur umbønina um eykajáttan og tekur støðu til tølini og hvussu hetta verður fíggjað. | | |
| Dagf | | | |



**<u>Fíggjarnevndin 23. september 2024:</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttan uppá 3,6 mió. kr. íroknað liðugtgerð av vegi/gongubreyt á Toftanesvegnum og at hetta verður fíggjað av innistandandi(meirinntøka kommunuskatt).

**<u>Býráðið 26. september 2024:</u>**
Býráaðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um eykajáttan uppá 3,6 mió. kr.

## 33/24
## 24/00250-5 Uppskot til ársfíggjarætlan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 51/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 33/24 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býraðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar býráð skal í seinasta lagi 1. desember 2024 hava samtykt fíggjarætlanina fyri 2025.<br><br>Fyrisitingin hevur fingið inntøkumetingar frá TAKS fyri kommunuskatt, skatt av kapitaleftirlønum og skatt av DIS/FAS. Eftir er at meta um partafelagsskattin komandi árið.<br><br>Á útreiðslusíðuni hevur umsitingin gjørt sær metingar av lønar- og prísvøkstri, so framskrivingar af útreiðslusíðuni kunnu gerast.<br><br>Fíggjarnevndin og harnæst býráðið skulu taka avgerð um bæði rakstrar og íløgukarm herundir, skattaprocent, barnafrádrátt og raðfestingar á ymisku rakstrarstøðunum.<br><br>Viðfest erui skjøl, sum verða grundarlag fyri viðgerðini í fíggjarnevndini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §16 1. petti í kommunustýrisskipanini hjá Fuglafjarðar kommunu skal uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár verða løgd fyri býráðið áðrenn 1. oktober. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt:** Kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• **Møgulig fylgiskjøl:** Notat um yvirskipaður karmar fyri fíggjarárið 2025 og JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíoggjarnevndin tekur støðu til karmarnar fyri fíggjarárið 2025, sum verður lagt fyri býráðið til støðutakan. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Tilmæli til býráðsfundin 26.09.2024.**<br>Mælt verður býráðnum til taka støðu til fylgjandi karmar:<br>• Skattaprosentið verður óbroytt 21,25%<br>• Barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Hendan hækkingin svarar samanlagt til umleið 192 tkr. í 2025.<br>• At raksturin verður framskrivaður við dagførdum lønarkarmi og lønarhækking uppá 4%, sum gevur ein netto rakstrarkarm á 86,3 mió. kr., sum er 3,3 mió. kr. hægri enn í 2024.<br>• At løgukarmurin verður 30 mió. kr. netto |
| Dagf | 20. september 2024 |

**Fíggjarnevndin 23. september 2024:**
Fíggjarnevndin mælir til, at skattaprosentið verður óbroyttur 21,25% og barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Mælt verður til at lønirnar verða dagførdar við lønarliftinum og síðani framskrivaðar við 4%. Á íløgusíðuni verða avsettar 30 mió. kr. netto.

**Býráðið 26. september 2024:** 15
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskot frá Sonna á Horni, um í mun til tilmælið frá fíggjarnevndini annars, at lækka skattaprosentið við 0,5 % til 20,75%. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri, Sheila S. Sóldal atkvøddi blankt og Eivind Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Sostatt fall uppskotið.

Síðani varð atkvøtt fyri tilmælinum frá fíggjarnevndini 23. september 2024. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

Fundurin lokin kl. 22.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Sheila S. Sóldal

Ólavur Larsen